# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

# Færeyinga Saga út á fornmálinum

**Íslendskt forlag gevur í hesum døgum út Føroyingasøgu á frummálinum, sum hon varð skrivað í Íslandi tíðliga í 13. øld. Útgávan er prentað serstakliga føroyskum lesarum og hevur føroysk inngangsorð**

BÓKAÚTGÁVA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Útgávan, sum kemur á gøtuna í dag, er partur av 25. bindi í ritsavninum Íslenzkum fornritum hjá Hið Íslenzka Fornritafélag, ið hevur givið út íslendingasøgur síðani 1933. Í ritstjórnini fyri ritsavnið sita Þórður Ingi Guðjónsson og Jónas Kristjánsson, og Ólafur Halldórsson, handritafrøðingur, hevur skrivað hesa útgávuna av Føroyingasøgu.

Á bakinum á útgávuni stendur eitt nú, at Føroyingasøga er søga um gøtuskeggjar, føroyska høvdingaætt, ið heiti bar eftir Gøtu í Eysturoy. Fyrstir av teimum ættmonnum, ið nevndir eru í søguni, er Torbjørn gøtuskeggi, faðir Tróndar, ið er høvuðspersónur søgunnar.

Víðari stendur, at ivaleyst munnu mangir føroyingar hava hug at lesa hesa merkisverdu fornu søgu á hennara íslendska frummáli, sum stendur føroyskum nútíðarmáli rættiliga nær. Harumframt kann útgávan við sínum vandaðu lýsingum og greiniliga inngangi eftir Ólaf Halldórsson, handritafrøðing, verða støði undir nýggjum rannsóknum og týðingum av søguni í Føroyum.



*Þórður Ingi Guðjónsson, bókmentafrøðingur og íslandsfrøðingur við lærda háskúlan í Íslandi er annar av ritstjórunum. Her við útgávuni, ið er prentað serstakliga føroyskum lesarum.*




# Væl nøgdir pedagogar

**Pedagogfelagið fegnast um, at semja nú er fingin í lag millum felagið og tað almenna.**

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Mikudagin skrivaðu Pedagogfelagið, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið undir semingsuppskot, og er semjan galdandi fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2005 – 1. oktober 2007.

Sambært Jarvin F. Hansen, formanni í Pedagogfelagnum, fegnast tey serstakliga um, at ein loysn varð funnin á tí, sum hann nevnir kardinalpunktið: At kommunurnar hava góðtikið, at dagstovnarnir hava fingið eina økta arbeiðsbyrðu og ábyrgd í sambandi við, at grein 5 í Dagstovnalógini varð broytt.

– Hetta er ein viðurkenning av, at tað ikki ber til bara at leggja økið út, uttan at peningur fylgir við, sigur Jarvin F. Hansen, við Sosialin. Og hann greiðir frá, at broytingar í flokkingunum í lønarstiganum hava við sær, at lægsta stigið fellur burtur og at hægsta stigið fer eitt upp. Sostatt eitur lønarstigin nú 11-17 í mun til áður, 10-16.

– Eisini fegnast vit um, at við semjuni verður gjørligt at sáttmálaseta pedagogar á øllum landsins stovnum, umframt at tað fer at bera til hjá tænastumannasettum, at taka tænastumannasetanina við sær í annað starv.

– Sum heild eru vit nøgd, hóast ein sjálvsagt altíð kundi hugsað sær meira, sigur Jarvin F. Hansen.

## Hvítt á Sornfelli

Mynd frá vevkameranum hjá Færøernes Kommando klokkan kl. 12:30 í dag.

